# Trupul pólkanning

Danska rannsóknarferðin norðan fyri Grønland vísti seg at verða truplari enn væntað. Christian Marcussen á danska jarðfrøðistovninum sigur við Ritzau, at tað var serliga ísurin, sum voldi trupulleikar, men at serfrøðingarnir eisini fáa gagn av at læra, hvussu tað er at arbeiða á slíkum leiðum. Við svenska ísbrótaranum Oden skuldu donsku vísindafólkini royna at prógva, at havbotnurin við Norðpólin hevur samband við grønlendsku undirgrundina.



# Børn á bygd fátæk

Kanningin av korunum hjá grønlendskum børnum vísir, at tað eru serliga børn á bygd, sum eru rakt av fátækradømi. Hetta kemur ikki óvart á sosiologin Maliinu Abelsen, og hon ávarar um, at tað grønlendska samfelagið er í ferð við broytast til eitt samfelag, har stórur munur er á fólki í býi og á bygd. Maliin Abelsen sigur, at tað er neyðugt at viðgera spurningin, um samfelagið er ført fyri at varðveita bygdirnar við lívsumstøðum, sum tey flestu vilja hava.



*Frá føroyska básinum í Aberdeen*



*Elin Heinesen, stjóri á SamVit og føroyski sendimaðurin í Bretland, Sigmund Isfeldt høvdu nógv um at vera*

útlendskar fyritøkur leggja sera stóran dent á, er trygd og umhvørvi. Tí er tað so umráðandi, at t.d. Atlantic Supply Base er á sama støði á hesum økjum, soleiðis at vit kunnu kappast við grannar okkara. Serliga mugu vit syrgja fyri, at vit eru klár til tað næsta stigið í vinnuni, tvs. tá ið oljan einaferð verður funnin. Tá ber ikki til at vera afturút t.d. viðvíkjandi trygd. Ein tílík ráðstevna er eisini sera hent hjá føroyskari oljuvinnu sum heild, av tí at ein kann hitta møguligar kundar beinleiðis. Tað at tosa við fólk 'face to face' er tann besti mátin at selja eina tænastu, sigur Eli Lassen.

## Mong vitjaðu

Nógv fólk vitjaðu føroyska básin teir fýra dagarnar ráðstevnan varaði. Fleiri av hesum høvdu heilt ítøkilig ørindi við ávísum føroyskum fyritøkum, men eisini heilt nógv vóru rætt og slætt bert forvitin at vita, hvussu langt er komið við oljuleiting á føroyska økinum. Eisini vóru onnur, sum komu á føroyska básin, tí tey kundu hugsa sær at ferðast hendavegin. – Samanumtikið kann ikki sigast annað enn at hetta var væleydnað. Umframt at fólk komu at vitja básin í "vinnu" ørindum, komu eisini nógv og bara spurdu um Føroyar sum heild. Og tað kann man bara gleðast um, sigur Unn Poulsen, vinnuráðgevi á SamVit. Offshore Europe verður aftur í 2009, men áðrenn tað verður ein ráðstevna av sama slag í Stavanger. ONS ráðstevnan, sum hon eitur, verður í 2008 og tá ætlar SamVit, saman við føroyskum fyritøkum at vera enn meira sjónlig.



*Eli Lassen frá oljubasanum í Runavík her saman við Sofus Poulsen, fyrrverandi føroyska umboðsmanninum í Aberdeen*